# KVINNUR VIÐ VÓN

## Bønaráheitanir fyri ASIA mai 2024

1. Faðir, gev trúgvandi kvinnum í Kina trúgvandi menn, so tær kunnu standa ímóti trýstinum frá foreldrunum at velja sær vantrúgvandi menn. Styrk hesar kvinnur í at nokta at hava kynsligt samband uttan fyri hjúnalag. (Hebrearabrævið 13:4)
2. Harri, verj kvinnur í Afganistan, ið uppliva forfylging og harðskap í sínum egna heimi. (Esaias 41:10)
3. Gud, lat kvinnur í Myanmar fáa lættari atgongd til heilsutænastur, so at tær fáa betri heilsu í viðgongutíðini, og talið av barnadeyða minkar. (Jeremias 17:4)
4. Faðir, lat mong fólk koma í kristnar samkomur og kirkjur í Japan, og ger tey før fyri at varðveita einleika Andans, at boða sannleikan í kærleika og búnast til at líkjast Kristusi. (Efesusbrævið 4:1-16)
5. Gud, vit biðja um, at atgongd kann fáast til reint vatn í bygdaøkjunum í India. Veit kvinnum góða heilsu og styrki, tá tær royna at tryggja sær vatn til húsarhaldið og kríatúrini. (3. Jóhannesarbræv 1:2)
6. Harri, hjálp hjúnum í Singapore at hava ráð til at fáa børn, og at tey bæði, maður og kona, hava ábyrgd av at taka sær av børnunum. (1. Mósebók 1:28)
7. Gud, vit biðja, at ung fólk í Suðurkorea fylgja bíbilsku meginreglunum um hjúnaband**,** og gifta seg heldur enn at liva saman ógift. (Matteus 19:4-6)
8. Harri, lat eina mentanarliga broyting henda, ið kann steðga siðvenjum í Pakistan viðvíkjandi hjúnalagi, ið eru skaðiligar fyri kvinnur. Lat ærudráp, gjald fyri brúðrar og sølu av døtrum sum arbeiðsgentur steðga við alla. (Sálmur 7:2-3; enskt:1-2)
9. Faðir, vegleið toymi okkara í landsynnings Asia, nú tey royna at gera *Kvinnur við Vón* sendingar og bera evangeliið um Jesus Kristus á malay málinum í ár. (Sálmur 96:3)
10. Styrk hjúnaløg í Mongolia, Harri. Verj, ugga og ger útvegir fyri einligar mammur, ið bera tungu byrðarnar við at taka sær av familjuni orsakað av hjúnaskilnaði. (Sálmur 68:6; enskt:68:5)
11. Gud, lat kvinnur í Nepal fáa størri møguleikar til útbúgving, ið kann geva teimum førleikar, ið eru neyðugir fyri at tær kunnu mennast persónliga og yrkisliga. (Orðtøkini 16:16)
12. Faðir, styrk og verj kvinnur í Kambodja, ið standa í andaligum bardøgum. Lat tær standa stinnar í trúnni og vaksa í lýdni fyri Orði Tínum. (Sálmur 28:7)
13. Harri, vegleið toymi okkara í Indonesia, ið ger *Kvinnur við Vón* sendingar. Gev teimum vísdóm at nýta nýggja tøkni, so bønar-álmanakkin kann røkka longri út. (Orðtøkini 4:6-7)
14. Himmalski Faðir, gev filipinskum foreldrum vísdóm, hvussu tey kunnu vegleiða og uppala treisk børn. (Orðtøkini 1:8-9)
15. Vit prísa tær, Faðir, fyri møguleikan at gera *Kvinnur við Vón* sendingar á Hmong málinum fyri at náa Hmong fólkið, ið býr í Laos, í norðara parti av Vietnam og í Tailandi. (2. Sámuelsbók 22:50)

16. Gud, lat unga ættarliðið í Kina taka ímóti Tær og fáa verju, grøðing og vegleiðing frá Tær. Lat tey koma til Tín við sínum viðurskiftum við onnur, viðvíkjandi arbeiði og tí, sum teimum annars tørvar. (Matteus 7:7)
17. Faðir, lat etniskar minnilutar í Afghanistan taka ímóti evangeliinum og kenna, at tey eru virðismikil, tí tey eru skapt í Tíni mynd. (1. Mósebók 1:27)
18. Gud, lat stjórnina í Myanmar virka fyri at verja kvinnur, so tær kunnu arbeiða og búgva trygt, ímeðan harðskapur og ótryggleiki økist. (Sálmur 23:4)
19. Harri, lat nógvar kvinnur í Japan koma til trúgv gjøgnum *Kvinnur við Vón* sendingarnar. Legg fleiri aftrat teimum í hesum landinum, sum vilja veita mánaðarligan stuðul til at fíggja hesa trúartænastu. (Esaias 52:7-10)
20. Faðir, verj konur í India frá at verða burturførdar, frá harðskapi, neyðtøku og øðrum, ræðuleikum, ið menn teirra og skyldfólk hjá teimum fremja. (Kolossebrævið 3:19)
21. Gud, signa royndina at fáa pening til vega til at fara undir ein bíbliuflokk í norðrara parti av Vjetnam fyri kvinnur, ið hava tikið prógv á framhaldsskúlum og fyri konur hjá pastorum. (Rómbrævið 12:2)
22. Faðir, vit biðja fyri teimum, ið eru rýmd undan stýrinum í Norðurkorea til Suðurkorea. Veit teimum miskunn í royndini at seta búgv í einum nýggjum samfelag. (3. Mósebók 19:33-34)
23. Harri, vit biðja um, at heilsuskipanin í Pakistan má broytast, so framstig í viðgerðum við nýggjum heilivági eisini kunnu umfata kvinnur. Ger heilsurøktina har betri, serstakliga viðvíkjandi heilsutrupulleikunum hjá kvinnum. (Sálmur 139:13-15)
24. Harri, grøð sál og sinni hjá kvinnum í Kambodja, ið hava verið úti fyri skelki og truplum umstøðum. Gev teimum frið, troyst og sálarliga heilsubót. (Sálmur 147:3)
25. Harri, vegleið leiðarar í Papua Nýguinea at bøta um heilsuskipanina, sum er undirfíggjað, og har talið á teimum, sum hava malaria og sukursjúku er ómetaliga høgt. (Jeremias 33:6)
26. Nógvar ungar gentur í Mongolia fáa ov tíðliga fødd børn ella eru smittaðar av onkrari kynssjúku. Harri, hjálp teimum at síggja vísdóm Tín í at halda seg kynsliga reinar til tær giftast. (Jákupsbræv 1:14)
27. Faðir, gev kvinnum í Nepal møguleika til at fáa eitt inniligari samfelag við Teg og finna troyst á trúarleiðini. (Jákupsbræv 4:8)
28. Gud, lat toymi okkara í Indonesia verða ført fyri at útvega fígging í landinum, so tey kunnu fara undir eina uppfylgjandi trúartænastu, ið kann veita teimum, sum lurta eftir sendingunum, andaliga ráðgeving og hjálp. (Jákupsbræv 1:27)
29. Faðir, lat filipinskar familjur søkja Teg, sum tann sum vegleiðir og uppiheldur øllum, gjøgnum trupulleikar viðvíkjandi heilsu, peningi, par-sambandi og arbeiði. (Orðtøkini 3:6)
30. Faðir, vit biðja, at heilsutænastan í Nepal skal batna, so kvinnur har kunnu hava møguleika at fáa báði likamliga og sálarliga hjálp. (Jeremias 30:17)
31. Lat tey, sum lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum í Vjetnam, og sum fáa vitjan av kirkju- og samkomuleiðarum, búnast í samfelagnum við Teg, Harri. (Rómbrævið 1:10)

**“Høvuðsstuðulin í øllum kristiligum arbeiði er bøn”**
**(Eeva Vähäsarja)**

# At sameina hjørtu okkara í bøn

## At velja trúnna – ein søga um vón – mai 2024

**eftir Maribeth Hynnes Stevens, sjálvboðin hjá TWR *Kvinnur við Vón***

Gud heldur fram við at nýta TWR *Kvinnur við Vón* at ávirka lívið hjá kvinnum kring allan heimin. Stutt síðani fekk toymi okkara í landsynnings Asia ein vitnisburð frá einari kvinnu, ið lurtaði eftir *Kvinnur við Vón* sendingum í Indonesia.

Sumarni* skrivaði: “Eg eri í eini torførari støðu. Maður mín rýmdi frá mær og børnunum, og hetta hendir hvørja ferð, ið vit hava trupulleikar í hjúnalagnum. Hesa ferð er hann ikki afturkomin. Satt at siga kenni eg meg sera troytta, hvussu eg sum kvinna skal bera meg at viðvíkjandi atburði hansara. Haraftrat má eg eisini arbeiða fyri at forsyrgja okkara smáu børnum, og sjálvsagt eisini at taka mær av teimum. Dagliga byrðan er sera tyngjandi fyri meg, og til tíðir kenni eg, at eg ikki megni hana longur.”

Sumarni prísaði Gudi fyri *Kvinnur við Vón* sendingina og segði: “Eg kendi meg signaða og styrkta, og eg veit nú, at eg framhaldandi má vera sterk í trúnni og ikki falla í vónloysi.” Hon varnaðist eisini, at uttan mun til, hvat henni er fyri í lívinum, má hon halda fram við at hava vón sína á Jesus, ið altíð gevur styrki og vegleiðing. Hon legði aftrat, at hon fekk ikki einans andaliga hjálp gjøgnum sendingina, men fekk eisini góða praktiska vegleiðing viðvíkjandi heilsuráðum, ið var henni til hjálp.

Eftir at hava lurtað eftir *Kvinnur við Vón*, skilti Sumarni, at Gud hevur eina ætlan við hennara lívi ígjøgnum trupulleikar.

Hon segði: “Gud ynskir eisini at menna og bøta um mítt lyndi, so eg kann gerast ein betri kvinna, kona og mamma. Eg má læra meg at hugsa um tað, ið er neyðugt hjá mær at gera betri.”

Hon ynskir at virka fyri góðum samskifti við mann sín, so at hjúnalag teirra og familjan kann verða signað av Gudi.

Sumarni endaði við at siga: “Eg eri sanniliga takksom fyri at kunna lurta eftir hesi sendingini. Eg trúgvi, at mangar kvinnur eru signaðar, eins og eg.”

* Ikki hennara veruliga navn

# Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

**Fíggjarstuðul:**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145 til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio).**
**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR.**
**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**